# Soleiðis ritar tú inn

VEGLEIÐING

## 1 Far til www.vangin.fo

Lat upp kaga (Chrome, Firefox, Edge osfr) og skriva www.vangin.fo



## 2 Rita inn

Trýst á 'Rita inn'.
Á Vanganum er knøtturin uppi í høgra horni.




## 3 Skriva títt P-tal




Ein nýggj skermmynd kemur fram. Skriva títt P-tal (9 tøl uttan striku ella millumrúm) og vel síðan 'Rita inn við App'.

## 4 Samanber myndirnar

Ein mynd verður víst á telduskerminum.
Lat upp Samleika appina á telefon/teldil, har ein mynd eisini verður víst.
Kanna um myndirnar eru eins.




## 5 Góðkenn myndirnar

Trýst á grøna flugubeinið fyri at góðkenna, at myndirnar eru eins.




## 6 Skriva persónliga loynitalið

Skriva títt persónliga loynital í Samleika appina á telefon/teldil. Hetta er nummarið, sum tú valdi, tá ið tú bílegði Samleikan




## 7 Tú ert ritað/ur inn

Tú ert nú ritað/ur inn á Vangan. Minst til at rita út við at trýsta á pílin í ovara høgra horni, tá ið tú ert liðug/ur.



Á heimasíðuni www.samleikin.fo finnur tú videovegleiðingar og góð ráð um, hvussu tú brúkar Samleikan.


Talgildu Føroyar - Brúkaratænastan - Staravegur 9 - 100 Tórshavn - telefon 1881 - 1881@talgildu.fo